Hergerð Joensen, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag:

# Skulu vit atkvøða hvør sær um døgurðatíman, skulu vit atkvøða hvør sær um alt

**– Men prinsipielt haldi eg, at arbeiðsfólk á sama arbeiðsplássi eiga at vera saman um avgerðirnar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*– Leiðslan á Kósini tekur eingi stig, so leingi Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag ikki hevur tikið støðu, sigur Hergerð Joensen, sum bæði er í nevndini í arbeiðskvinnufelagnum og í P/F Kósini*

Í Sosialinum herfyri skrivaðu vit, at ein ávís togan hevur tikið seg upp um døgurðatíman á flakavirkinum, Kósini. Undir eini atkvøðugreiðslu á virkinum, vildu 89 heldur hava ein matarsteðg millum 12 og 13 enn at fara heim til døgurða. Ein slík broyting hevði merkt, at vanligi arbeiðsdagurin var liðugur kl. 16 ístaðin fyri kl. 17. 31 fólk vóru ímóti at broyta døgurðatíman og 7 atkvøður vóru blankar.

Skipanin við matarsteðgi uppá ein hálvan tíma millum 12 og 13 merkir, at arbeiðsfólkið ikki missir hendan tíman á lønarseðlinum, tí døgurðatímin gevur dupulta løn. Ístaðin endar arbeiðsdagurin kl. 16, og verður arbeitt longri enn tað, fáa tey yvirtíðarløn eftir kl. 16.

Í Klaksvík eru tvey arbeiðarafeløg, sum umboða ávíkavist kvinnur og menn. Feløgini skulu góðtaka eina slíka avgerð, um hon skal setast í verk. Hetta var eingin trupulleiki hjá arbeiðskvinnufelagnum, men arbeiðsmannafelagið segði seg ikki kunna taka støðu. Eitt slíkt svar kundi leiðslan á Kósini ikki brúka til nakað, og tískil er einki hent við døgurðatímanum á Kósini enn; fólk fara heim til døgurða sum vanligt, og eingin veit, nær ella um skipanin, ein stórur meiriluti av arbeiðsfólkinum vil hava, verður sett í verk.

### Atkvøða hvør sær

Av teimum 5 nevndarlimunum í arbeiðsmannafelagnum, arbeiða teir fýra á Kósini, og sum skilst, er nevndin í felagnum ónøgd við, at arbeiðsfólkið undir umrøddu atkvøðugreiðsluni ikki atkvøddi hvør sær, t.v.s. konufólkini fyri seg og mannfólkini fyri seg. Á hendan hátt hevði felagið havt eina greiðari mynd av, hvat menninir vilja.

– Trupulleikin er, at her eru tvey feløg og eitt arbeiðspláss, sigur Hergerð Joensen, næstformaður í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Hon dugur tó ikki at síggja, hví arbeiðsfólkið júst í hesum førinum skal atkvøða hvør sær, tí talan er um eitt og sama arbeiðspláss.

– Vit tóku úrslitið til eftirtektar, tí meirilutin var so stórur, sigur hon.

Hon vísir á, at arbeiðsfólkið á Kósini annars atkvøður saman um onnur viðurskifti.

– Skulu kvinnu og menn atkvøða hvør sær um døgurðatíman, haldi eg, at hetta eisini eigur at vera galdandi, tá ið atkvøðast skal um eitt nú álitisfólk, starvsfólkaumboð og trygdarumboð.

Hergerð heldur annars prinsipielt, at arbeiðsfólk á sama arbeiðsplássi eiga at vera saman um avgerðirnar.

### Tíðir broytast

– Tá ið ein so stórur meiriluti ynskir at stytta dagin við einum tíma, og tey nú hava møguleika til tess, dugi eg ikki at síggja, hví feløgini skulu seta seg upp ímóti hesum.

Hergerð vísir á, at fyrr vildu fólk altíð sleppa heim til døgurða, tí skúlabørnini komu heim til døgurða. Í dag hava børnini matpakka við og koma ikki heim, fyrr enn skúlin er liðugur.

– Tey, sum hava børn, ið koma heim úr skúlanum út á seinnapartin, hava ampa av, at børnini eru so leingi einsamøll; tí hevði tað passa nógvum foreldrum betri, um arbeiðsdagurin var liðugur kl. 16 heldur enn kl. 17.

Á Kósini er stór kantina, sum tekur eini 170-200 fólk. Har gera tey døgurða, og tey eru ikki so fá, sum ikki fara heim til døgurða, men eta máltíðina á virkinum. Nøkur keypa sær eisini døgurða heim við.

– So, karmarnir um at hava matarsteðg millum 12 og 13, eru teir bestu, sigur nevndarlimurin.

Hvat hendir nú, spurdu vit Hergerð, sum eisini eru í nevndini í P/F Kósini?

– Málið er steðgað fyribils, tí leiðslan vil eingi stig taka, so leingi arbeiðsmannafelagið ikki hevur tikið støðu, sigur hon.

### Døgurðatímin avtikin á Roykivirkinum

Hergerð Joensen vísir á, at fyrr í ár ynsktu tey, sum arbeiða á Roykivirkinum, Pure Water, at hava ein matarsteðg í døgurðatímanum og so sleppa ein tíma fyrr til hús.

– Virkið sendi okkum ein lista, har fólk, sum ynsktu matarsteðg, høvdu skrivað undir. Eingin var ímóti. Størsti parturin av arbeiðsfólkinum á Pure Water eru kvinnur.

Nevndarlimurin sigur, at tað var eingin trupulleiki hjá felagnum at taka undir við hesum.

– Skipanin á Roykivirkinum byrjaði fyri summarfrítíðina, og sum skilst, eru tey fegin um broytingina, sigur Hergerð Joensen.

# Fleiri sjúkrasystrar í starv

**Besta og í longdini bíligasta loysnin á kreppuni á B6 er at seta fleiri sjúkrasystrar í fast starv**

TÍÐINDASKRIV
*Hjálparlæknaráð Føroya*



*Jens Andreasen, formaður fyri Hjálparlæknaráð Føroya*

Støðan á deild B6 á Landssjúkrahúsinum er vorðin sera spent, og lítið røkist fyri einari loysn, nú 18 sjúkrasystrar hava sagt upp pr. 1.januar. Deildin er serdeild fyri ymsar medisinskar sjúkur, og sjúkrasystrarnar sum arbeiða har hava serkunnleika um hesar sjúkur. Fyri stuttum var eisini settur ein yvirlækni fyri serliga at vara av hesi deild, eftir at deildin ikki hevur havt ein yvirlækna við hesari funktiónini í fleiri ár.

Vónandi fer hesin serkunnleiki ikki í upploysn, nú útlit eru fyri, at deildin ikki kann virka sum higartil eftir 1. Januar 2001. Hóast umstruktureringar sum kunnu bøta um verstu avleiðingarnar fer hetta uttan iva at føra við sær verri viðurskifti á fleiri økjum. Fyrst og fremst fyri diagnostisering, viðgerð og røkt av sjúklingunum við áðurnevndu sjúkum, men eisini onnur viðurskifti sum t.d. útbúgvingarviðurskiftini fyri eitt nú yngri læknar.

Hjálparlæknaráð Føroya skilir væl, at sjúkrasystrarnar sum nú hava sagt upp hava ætlanir um at arbeiða via eitt vikarbureau fyri eina hægri tímaløn enn tímaløntar eru vanar við í løtuni. Sum er fáa tímaløntar sjúkrasystrar ikki kompensatión fyri, at tær ikki eru umfataðar av sáttmálarættindum sum t.d. pensjón, løn tá tær eru sjúkar og 1. sjúkradag hjá barni. Hinvegin heldur Hjálparlæknaráð Føroya ikki, at tað er gott fyri kontinuitetin at grunda arbeiðið hjá sjúkrasystrunum á eitt vikarbureau, sum eisini kann koma at kosta dýrt.

Við hesum í huga vil Hjálparlæknaráð Føroya heita á leiðsluna á Landssjúkrahúsinum at ganga krøvunum hjá sjúkrasystrunum á møti við at seta fleiri sjúkrasystrar í fast starv á B6. Hetta hevði forðað fyri, at deildin dettur niður fyri 1. januar, hevði tryggjað sjúkrasystrunum sáttmálaviðurkend arbeiðskor og í longdini verið ein bíligari loysn fyri Landssjúkrahúsið enn útlit eru fyri í løtuni.

Vónandi hevur leiðslan eisini vilja til at bøta um støðuna við t.d. brotnum og vantandi tólum á deildini, sum sjúkrasystrarnar hava víst tørvur er á.





*Vit minka nógv um ferðsluvandan t. d. við skúlar, um ferðin verður sett niður, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, sum heldur, at fysisku umstøðurnar eiga at verða broyttar soleiðis, at bilførarar verða noyddir at minka um ferðina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Duga ikki at brúka ljósini

**Tað er til miklan ampa fyri ferðsluna, at bilførarar ikki duga at sløkkja nærljósini, tá steðgað verður á vegjaðaranum. Ferðslutrygd kennir trupulleikan, men hann er trupul at loysa**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*



*– Tað vísir seg at vera sera trupult at fáa fólk at nýta ljósini á bilinum rætt, staðfestir Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd.*

– Tað sær út sum, at nógv av teimum, sum koyra bil, ikki geva sær far um, hvussu ljósini skulu brúkast. Hetta sigur ein maður av bygd, sum nú um dagarnar ringdi til Sosialin at kæra sína neyð. Hann heldur, at tað hevur so ómetaliga stjóran týdning, serliga í myrku tíðini, at ljósini verða brúkt rætt.

– Alt ov lítið verður hugsað um vandan, ið kann standast av, at ljósini ikki verða sløkt, tá tey ikki eiga at lýsa. Hann heldur, at annaðhvørt er lógin ov illa lýst, ella er hetta ein ófyrigevilig líkasala, sum valdar.

Og vit kunnu bara geva manninum rætt, tá hann vísir á, at fólk javnan lata bilin standa og lýsa beint ímóti ferðsluni, meðan tey fara í ein handil at keypa. Hetta setir bæði fótgangarar og bilaferðsluna annars í stóran vanda.

Í Havn er hesin trupulleikin eisini eyðsýndur, ikki minst uttan fyri skúlarnar í býnum. Fólk sleppa børnum av, men tveita tey samstundis út í eina deyðsfellu, tí tey blenda mótkoyrandi ferðsluna.

– Ein óskikkur afturat at nevna er brúkið av tokulyktum, sigur maðurin. Fleiri av nýggju bilunum hava góðar og sterkar tokulyktir, men tað eru einanas roknaðar til at brúka, tá tað er myrkt í mjørka. – Men tíverri lýsa tær hjá mongum alla tíðina og eru til miklan ampa fyri hini í ferðsluni, vísur maðurin á. Hann heldur, at í hesum máli vantar upplýsing í stóran mun.

– Tað vísir seg at vera sera trupult at fáa fólk at nýta ljósini á bilinum rætt, staðfestir Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd. Hann sigur, at tað er sera tungt hjá Ferðslutrygd at skipa fyri stórum lýsingarátøkum, sum kanska bara høvdu bøtt um støðuna eina tíð.

– Hetta er ein løgin trupulleiki. Fólk síggja ikki síni egnu ljós, og tey hugsa mest um seg sjálvan. Gjørdu vit eina stóra herferð, so høvdu vit kanska broytt hugburð hjá 10% av bilførarunum, men tað vísir seg, at tá ein tíð er fráliðin, so er galið aftur, sigur Jón Kragesteen.

Ferðslutrygd hevur ikki neyðugu fíggjarligu orkuna til at fara undir slíkar herferðir, og tí eru heldur ongar ætlanir um slíkt júst nú. Men Jón Kragesteen vísir á, at um ferðin varð sett niður á teimum støðum, har hesin trupulleikin er, so minkaði vandin nógv.

Fyrr í ár skipaði Ferðslutrygd fyri eini ferð til Trollhättan í Svøríki, har tey hava gjørt sera nógva gransking innan ferðslutrygd. Við í ferðalagnum vóru politikarar, fólk, ið fáast við ferðslu og fjølmiðlarnir. Har sóu føroyingar í verki, hvussu sviiar halda, at ferðslutrygdin verður best vard. Niðurstøðan frá hesum túri kann lýsast stutt við, at har bilar kunnu koyra skjótt, skal eingin mótkoyrandi ferðsla verða. Har vegir krossa koyribreytina, skal ferðin setast niður, og har fólk ferðast á koyrbreytini skal ferðin heilt niður á 30 km/t. Jón Kragesteen heldur, at t. d. við skúlarnar í Havn átti ferðin at verið sett niður á 30 km/t, og har átti koyrbreytin at verði gjørd soleiðis, at ikki bar til at koyra framvið bilunum, sum seta børnini av.

Hetta hevði darvað ferðsluna nakað, men vit høvdu vunnið tað aftur við trygdini, sigur Jón Kragesteen.

HYGG HER
Ivan Johannesen Bilar
Brúktir bilar til sølu
Mitsubishi Pajero 3H
km. 206.500, árg. sep. 1988
45.000,-
Mitsubishi Lancer 1,8 GLXI 5H
km. 118.000, árg. juni 1992
50.000,-
Citroen ZX 1,4i 5H
km. 102.000, árg. aug. 1995
70.000,-
Ford Escort 1,6D GLX 4H
km. 187.000, árg. nov. 1995
51.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GTI 4H
km. 170.000, árg. mai 1989
59.000,-
Ford Fiesta 1,8 Diesel 3H
km. 140.000, árg. okt. 1991
45.000,-
Kia Pride 3H
km. 29.500, árg. jan. 1996
60.000,-
Citroen Berlingo 1,9 diesel 3H
km. 50.000, árg. jan. 1998
112.000,-
Nissan Primera 2,0 SLX 4h
km. 29.000, árg. aug. 1997
115.000,-
Mitsubishi Carisma 1,8 GDI 5H
km. 62.000, árg. jan. 1999
125.000,-
BMW 318i 4H
km. 27.000, árg. mar. 1999
205.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GTI 5H
km. 180.000, árg. feb. 1992
95.000,-
Seat Cordoba D Stc. 5H
km. 35.500, árg. aug. 1999
125.000,-
Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 101.000, árg. jun. 1996
135.000,-
Fiat Tipo 5H
km. 105.600, árg. mai 1989
26.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GLS 4H
km. 68.000, árg. feb. 1995
165.000,-
Mazda E2200
km. 81.500, árg. mar. 1997
95.000,-
Vælkomin til
Ivan Johannesen Bilar